# búskapur



*Skal ikki siga annað enn at løgmaður hevur dirvi*

enn væntað. Ein trupulleiki við knappliga at gerast ómetaligur ríkur er, at tað gerst eitt stórt hol í lummanum" har peningurin er, og skuldi verðið liggjandi. Manna millum er fyribrigdið "easy come easy go" ikki ókent.

Minnist meg rætt, var ein feril av vælverukenslu manna millum fyri stuttum her á landi. Staddur í Grønlandi seinastu árini var tað eitt sindur ørkymlandi at síggja, hvussu menn knappliga broyttust. Eg haldi, at rættari er at kalla fyribrigdið fyri fíggjarliga rúsgleði.

Sum búskaparligt fyribrigdi er oljuvinnan væl ikki annað - stutt sagt - enn at finnur ein eitt oljunám, fær oljuna til høldar, selur hana, og so goymur tað veruliga gullið- nevniliga peningin. Nýta vit peningin er hitin stokkutur. Hollendska dømið var timburmenn. Peningurin var nýttur - og hvat so? Jú, fólk gjørdust arbeiðsleys, undirskot á fíggjarlógini o.s.fr.

Høvuðsmunurin millum hollendingar og norðmenn var at norðmenn ikki hava uppfatað oljuna sum inntøku, men sum ogn. Støðisfæið olja bleiv umbroytt til pening. Norðmenn avmarkaðu seg til at nýta avkastið av peninginum til samfelagið. Nógv tann størsti parturin av norska oljupeninginum er umgjørdur til virðisbrøv.

Norðmenn hava lært seg **búskaparligt hovsemi**. Heldur liva av rentuni enn at halda eitt rimmar gildi - og so leita eftir syndabukkum tá peningurin er burtur.

> Kjarnin í viðmerking míni er, at finna vit olju eigur uppfatanin at vera, at talan er um ogn. Harnæst at flyta rættin at ráða yvir peninginum í grunn, sum er leysur av politisku skipanini. Hetta fyri at tryggja búskaparligt hovsemi.

Sjálvur haldi eg, at olju/gassvinnan hevur víst seg at hava stóran týdning fyri samfeløgini, vit væl kenna. Summi hava ringar royndir summi frægari. Mín niðurstøða er, at hovsemi er loysnin. T.d. vitja ikki ferðafólk Kuweit ella aðrar oljutjóðir. Heilt einfalt tí alt er ov kostnaðarmikið fyri vanlig ferðafólk.

Politiska skipanin hevur alla ábyrgdina av, at okkara náttúrutilfeingi, tað verið seg fiskur ella olja og gass, skulu umsitast. Her eiga vit at hugsa øðrvísi, verður talan um olju. Munurin á livandi tilfangi og olju er, at oljan knappliga ikki er meira. Gera vit sum hollendingar, gerst hitin stokkutur.

Tann moralski spurningurin er hvørt vit, sum í dag liva, skulu nýta gott av tí tilfeingi sum møguliga finst. Her kemur kjakið um burðardygga fíggjarliga leiðslu inn í myndina. Nakað vit ikki hava sæð nógv til. Talan er er her um fíggjarstýring og als ikki talan um stýring av eini komandi oljuvinnu, ikki hvør er innan oljuvinnuna, men hvør hevur tamarhald á tí peningi, sum fæst frá inntøkuni.

Ein 10 ára ætlan krevur uttan iva umhugsni og innlit og eitt sera stórt arbeiði av mongum klókum høvdum, fyri ikki at tala um tann politiska partin.

Sosialurin
Sosialurin
i

TEMPUR hjá IDEmøblum




÷15%
hósdag - fríggjadag - leygardag

VIKUSKIFTIS TILBOÐ
framúrskarandi Tempur madrassur

Við Tempur madrassuni fært tú ein róligari og djúpari svøvn, tí tú vendir tær munandi minni um náttina. Tað gevur tær meiri yvirskot at njóta tað, sum er vert at njóta.

Nýt hetta høvið og fá tær kollveltandi madrassuna fyri minni kostnað hetta vikuskifti.



TEMPUR RÁÐGEVI VITJAR
Leygardagin 26. februar millum klokkan 10 og 14 ber til at fáa góð ráð og vegleiðing frá Tempur ráðgevanum, ið vitjar Idé møblar

*Royn okkara rúmdarkliva og droym um ein betri svøvn.*



Tempur er eitt toyggiligt, hitaávirkiligt evni av smáum, opnum rúmum, ið fylgja umhvarvinum hjá kroppinum. Opnu rúmini lata luft streyma gjøgnum madrassuna, so kropshitin verður varðveittur. Madrassin flytir seg varliga við kropsins landslagi, so fullkomin stuðul verður givin, uttan at tað elvir til móttrýst.

TEMPUR
MADRASSUR OG PÚTUR
SUM LÆTTA UM
www.tempur.dk

IDEmøblar
Uppi á Hálsi, Tórshavn, Tel 354680

| | |
|---|---|
| Mánadag - hósdag | 9.00 - 17.30 |
| Fríggjadag | 9.00 - 18.00 |
| Leygardag | 10.00 - 14.00 |